# Yvirlit yvir áheitanir og tilmæli til politisku skipanina í sambandi við almenna hoyring um mannarættindi 22. januar 2026

Uttanríkistænastan í Uttanríkis- og mentamálaráðnum skipaði fyri hoyringini. Endamálið var, at áhugafelagsskapir og almenningurin fingu høvi til at siga sína hugsan um mannarættindastøðuna í Føroyum. Skipað varð fyri hoyringsfundinum, tí Føroyar saman við Danmark og Grønlandi síðst í januar 2026 skuldu lata inn til Sameindu tjóða ta fjórðu frágreiðingina um yvirskipaðu mannarættindastøðuna í danska kongsríkinum. Hetta er tann sokallaða UPR (Universal Periodic Review) frágreiðingin hjá danska kongsríkinum, sum føroyska frágreiðingin er partur av. Tey, sum førdu fram sjónarmið til hoyringina vóru:

- MEGD (bar síni sjónarmið fram í framløgu, sum var á skrá)
- Brekumboðið (bar síni sjónarmið fram í framløgu, sum var á skrá)
- Barnabati (bar síni sjónarmið fram í framløgu, sum var á skrá)
- ADHD felagið
- Føroyingar fyri friði
- Føroya Pro Vita
- Frælsisfylking anarkistanna
- LGBT+ Føroyar
- 4 privatpersónar

Niðanfyri er evnisbýtt yvirlit yvir tær áheitanir og tey tilmæli til politisku skipanina, sum vórðu borin fram undir almennu hoyringini.

## Yvirskipað um mannarættindi

- Menna grundarlagið undir almennari stýring við at skipa ein føroyskan trivnaðarkarm við viðkomandi hagtølum sambært brekrættindasáttmálanum og OECD Wellbeing Framework, sum eisini fevnir um lívsgóðsku, luttøku og atkomu til samfelagið.
- Smíða eina langtíðar vælferðarætlan í samstarvi millum myndugleikar og feløg fyri at menna ítøkiligu rættindi hjá fólki, ið bera brek, sambært brekrættindasáttmálanum.
- Dagføra lógargongdina við at skipa eina mannarættindatilgongd við samskapan, har viðkomandi partar, m.a. feløg hjá fólki, ið bera brek, kunnu kjakast og semjast um rættindi, ið síðani verða skrivað inn í lóggávu.
- Kanna nærri fyrimunirnar við at skipa lógargondina sum ringrás, soleiðis at fólk ikki detta niður ímillum skipanir.
- Innkorporera Brekrættindasáttmálan sum løgtingslóg.

- Seta á stovn eina óhefta mannarættindaeind ella mannarættindastovn í Føroyum, sum hevur ábyrgd av at hava eftirlit við mannarættindum, og sum kann ráðgeva og samskipa við myndugleikar, áhugafelagsskapir og borgarar.
- Skipa eina diplomatiska friðarskrivstovu í landsstýrinum, sum arbeiðir við diplomatiskum friðarloysnum og atknýttum virksemi við atliti at vápnaavdubbing.
- Hugsa mannarættindi breiðari sum menniskjarættindi, fyri at tryggja kynsneutralitet og inklusjón.
- Virða lívið hjá øllum menniskjum, eisini ófødda barninum og rættin hjá børnum at verða fødd.

**Rættartrygd og virksemi hjá almennum myndugleikum og stovnum**

- Styrkja fólkaræðið við meiri gjøgnumskygni, ábyrgd og opinleika hjá almennum myndugleikum.
- Tryggja, at almennir stovnar svara borgarum, at fyrisitingin viðger borgarar eins, so tað ikki er óvissa um rættindi og møguleikar hjá borgarum.
- Tryggja greitt ábyrgdarbýti á brekøkinum, soleiðis at ein eind ella myndugleiki hava høvuðsábyrgd.
- Stytta málsviðgerðartíðina, tá ið tað snýr seg um arbeiði og endurbúgving, so fólk kunnu gerast virkin partur av samfelagnum.
- Betra rættartrygdina, so borgarar lætt skilja, hvar teir kunnu kæra, hvussu tað kann kærast, og at borgarar fáa svar upp á sínar kærur.
- Hava óheft eftirlit við fjølmiðlum, sum tryggjar borgararættindi, eitt nú um ágangandi innsløg verða gjørd um borgarar.
- Almennir stovnar eiga at bera um umbering, um tað vísir seg, at skipanin hevur elvt til, at borgarar hava verið fyri órætti.

**Børn og ung**

- Tryggja, at Barnarættindasáttmálin verður settur í verk í praksis – ikki bara í lóg.
- Seta á stovn eina samanhangandi hjálparlinju fyri børn og ung, sum er opin alt døgnið.
- Styrkja fyribyrgjandi arbeiði í skúlum og nærumhvørvi, sum styrkir felagsskap, trivnað og kensluna av at hoyra til.
- Hava samanhangandi skipanir, sum betra arbeiðið millum skúlar, heilsuverk, almannaverk og familjur, so at børn fáa rættstundis hjálp.
- Tryggja, at børn og ung verða hoyrd tíðliga, og at rødd teirra hevur veruliga ávirkan.
- Gera serlig átøk fyri børn í fátækaváða, so fíggjarlig støða ikki sker rættindi.
- Endurskoða skúlahættir, so spæl, hvíld, skapandi virksemi og náttúra verða styrkt.
- Stovna ungdómsráð við fokus á rættindi hjá børnum og ungum.

**Sálarlig heilsa og javnrættindi í heilsuverkinum**

- Gera eina ítøkiliga ætlan og finna fígging, sum styttir bíðitíðirnar til psykiatri og útgreining, serliga fyri børn og ung.
- Tryggja tíðarhóskandi útgreining, so fylgisjúkur og strongdarreaktiónir verða fyribyrgdar.
- Menna samanhangandi skipanir fyri børn, ung og vaksin við diagnosum, so fólk ikki standa uttan hjálp.
- Viðurkenna psykiatriska heilsu sum ein mannarættindaspurning og tryggja javnrætt millum somatiskar og psykiatriskar líðingar í lóggávu, fígging og praksis.

**Útbúgving, bústaðarmøguleikar, arbeiði og atkoma**

- Skapa karmar, har fólk við sálarsjúkum kunnu taka útbúgving og arbeiða sum partur av veruligum sosialum og fakligum felagsskapi.
- Tryggja javnbjóðis atgongd til útbúgving fyri fólk við breki og diagnosum, so øll ið bera brek hava møguleikan at taka eina útbúgving.
- Endurskoða reglur um fráveru í útbúgving, so frávera vegna brek ikki elvur til útilokan frá útbúgvingini.
- Tryggja, at fólk, sum eru í vardum starvi ella øðrum líknandi skipanum, verða lønt eina virðiliga løn.
- Betra bústaðarmøguleikar fyri ung og fólk við breki.
- Endurskoða reglur um inntøkutrygd og almannatrygd, so aldur ikki elvir til fíggjarligan mismun vegna aldur, ella um persónur er heimabúgvandi.
- Menna skipanir, sum gera, at fólk kunnu liva eitt vanligt arbeiðslív uttan varandi almennar veitingar.
- Veita neyðugan stuðul til hjálpartól og flutning, so fólk við rørslutarni kunnu gerast virkin partur av samfelagnum.

**Kyn og minnilutabólkar**

- Innføra løgfrøðiligt kynsskifti, so borgarar kunnu skifta p-tal og navn við greiðari mannagongd.
- Seta í verk handlingsætlan fyri kynsskifti og kynsminnilutar.
- Virka fyri, at Føroyar binda seg til aborttilmælini hjá WHO og hava eina tíðarhóskandi abortlóggávu.
- Leggja dent á at granska í anti-abort og kynssexismu í Føroyum.
- Leggja upp til, at Føroyar taka til sín sáttmálarnar móti haturstalu í einum føroyskum samanhangi og viðurkenna trupulleikan við haturstalu, tá ið tað kemur til rasismu, islamofobi og xenofobi, bæði á netinum og í politiskum kjaki.
- Seta tiltøk í verk at verja rættindi hjá gestaarbeiðarum í Føroyum og familjum teirra.